# ítróttur

Nr. 224 • týsdagur • 23. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# TB fær venjara úr Rumenia



TB hevur tryggjað sær venjaran til komandi kappingarár

**Fleiri útlendingar eru longu á Sevmýri, men møguleikin hevur verið nevndur, at nýggi venjarin skal at hava ein spælara til Tvøroyrar saman við sær**

TB FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*

Nú er tað greitt, at nýggi TB venjarin fer at koma úr Rumenia. Tað veit heimasíðani hjá TB, tb.fo, at siga. Sáttmáli varð í síðstu viku skrivaður millum TB og Eugen Neagoe. Hann er 37 ára gamalur og royndur álopsssspælari. Fyri tveimum árum síðani gavst hann at spæla. Hann hevur UEFA A licens sum venjari. Hann hevur verið høvuðsvenjari í næstbestu deildini í Rumenia, og seinastu tíðina hevur hann verið hjálparvenjari í Universitate Craiova. Talan er um eitt av fremstu feløgunum í bestu deildini í Rumenia. Eugen Neagoe spældi í síni tíð í mong ár í hesum felagnum.

Umframt í Craiova spældi Eugen Neagoe eisini í Ungarn, Grikkalandi og á Kypros. Hann var á fleiri ungdómslandsliðum og rakk U 21 landsliðnum. Tað er Ion Geolgau, sum var venjari hjá HB í fleiri ár og eisini vandi B36, ið hevur hjálpt TB at finna fram til nýggja venjaran, sum Ion hevur givið gott skoðsmál. Eftir at Ion fyrra partin av síðsta kappingarári var í Reykjavík og vandi Fram, er hann nú aftur í Rumenia.

## Fleiri útlendingar

Setningurin hjá TB verður næsta kappingarár fyrst og fremst at sleppa undan niðurflyting. Í ungdómsdeildunum eigur TB fleiri góðar spælarar. Tað vístu úrslitini í fleiri av yngru deildunum síðsta kappingarár. Fyri felagið er tað týdningarmikið, at tað aftur verður tradition at 1. deildarfótbóltur verður á Sevmýri. Tað fer at hava stóran týdning fyri menningina av ungu spælarunum.

Sum hjá so mongum øðrum feløgum verður tað í TB mett at vera neyðugt við hjálp aðra staðni frá. Umstøðurnar eru soleiðis, at tað er ógvuliga torført ella rættari ómøguligt at fáa spælarar norðanfjørðs at flyta suður at spæla fótbólt, hóast at tað hevði borið til at fingið arbeiði á við síðuna av. Onkrir spælarar hava onkra ferðina ferðast eitt sindur millum feløgini í Suðuroy, men enn hevur einki verið at hoyrt um, at nakar úr hinum trimum feløgunum í oynni skal flyta til TB. Um TB skal fáa styrk, so skal tað eftir øllum at døma vera úr útlandinum. Útlendingarnir, sum við vissu fara at hjálpa TB næsta ár, eru gamlir kenningar í Føroyum, men tað kann vera, at onkur nýggjur fer at koma afturat.

- Predrag Zivkovic hevur spælt fótbólt í Føroyum í fimm ár, so hann verður í fótbóltshøpi roknaður sum føroyingur. Tað vil við øðrum orðum siga, at vit kunnu hava fýra aðrar útlendskar spælarar. Ein teirra er Alexander Jovevic, sum síðsta kappingarár var á NSÍ miðvøllinum. Síðsta kappingarár høvdu vit tveir ghanesiskar spælarar, sum vit vóru væl nøgdir við. Sum tað sær út í løtuni, so er tað nógv, sum talar fyri, at teir báðir koma aftur henda vegin, sigur Bjarni Mortensen, sum er formaður í fótbóltsdeildini hjá TB.

Tað hevur ljóðað, at nýggi venjarin kanska skal spæla við sjálvur, og at hann møguliga skal hava onkran landsmann við sær til Tvøroyrar at spæla fótbólt, men tað liggur framvegis í tí óvissa.

– Venjarin hevur verið góður fótbóltsspælari. Rumenskur fótbóltur er jú á væl hægri støði enn okkara fótbóltur, og hann hevur spælt á høgum støði í heimlandinum og eisini í grannalondunum har niðri. Men tað eru tvey ár síðani, at hann spældi, og um hann skal spæla, so verður tað sjálvandi neyðugt hjá honum at fara undir aftur at venja samstundis, sum hann skal venja hinar. Møguleikin fyri at hann skal hava onkran landsmannin við sær henda vegin hevur verið nevndur, men enn er einki komið upp á pláss hesum viðvíkjandi, sigur Bjarni Mortensen.

Síðsta kappingarár var tað Jon Johannesen, sum hevði ábyrgdina av TB liðnum, sum vann 2. deild og harvið flutti beinleiðis upp í bestu deildini. Jon boðaði stutt eftir kappingarlok frá, at hann fór ikki at halda fram sum venjari. Jon var leikandi venjari, og sum vit hava skilt tað, so ætlar hann sær aftur næsta ár at vera við í kappingini um plássini á besta liðnum.


## Við 60-ára konto fáa vit ráð, tá vit fáa tíð





**Tað eru fleiri leiðir til góða eftirlønartilveru.**
**Felags fyri tær er fyrireiking.**
Vit vita ikki í hvørjum líki fólkapensiónin er um 30-40 ár. Tí vilja vit fegin kunna syrgja fyri okkum sjálvum.
Hetta gera vit við mánaðarligari uppsparing á 60-ára- og lutakonto í FØROYA BANKA.
Við uppsparing á 60-ára konto kann inngjaldið dragast frá skattskyldugu inntøkuni, og tað merkir skattalætta beinanvegin.

FØROYA BANKI




# John venur í Viborg

**Landsliðsveteranurin tekur tað tó sjálvur púra róligt, og sigur tað ikki verða nakað vónbrot, um hann ikki fær boðið sáttmála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*57 dystir og 8 mál fyri føroyska fótbóltslandsliðið var nakað, sum venjari hjá Viborg beit merki í, og hann hevur nú ynskt at hyggja nærri at fótbóltsevnunum hjá John Petersen*

Eftir 57 dystir og átta mál fyri føroyska fótbóltslandsliðið, takkaði John Petersen fyri seg, tá landsliðið í seinasta dystinum á árinum tapti 2-0 fyri Írlandi.

Mest tungtvigandi orsøkin í øllum hesum var, at unnustan var sloppin á skúla í Viborg, og at John saman við soninum flutti til Danmarkar, so skjótt sum landsliðsárið var av.

Eftir dystin í Írlandi staðfesti hann, at tað so ikki fór at verða til meira fótbólt í ár. Eisini tí hann við seinasta dystinum fyri B36 var farin út um tað markið, sum ásetur, nær leikari seinast skal hava spælt, um hann skuldi knýtast til danskt felag undan ársskiftinum.

## Beit merki í hagtølini

Men tú hevur so eina støðu, til ein nýggj er tikin, og hjá John Petersen gongur tann vegin, at talan er um nýggja støðu.

Niður komin til Viborg fann hann nevnliga út av, at ein kenningur hjá sær var venjari hjá Danmarks-seriu liðnum hjá Viborg.

– Eg spurdi so hann, um eg kundi venja við temum, og tað var gaman í.

– Tað var so bara eina viku, til teirra kapping fór í vetrarfrí, men eftirfylgjandi hevði Ove Christiansen, sum venur superliguliðið hjá felagnum, spurt seg fyri, um eg ikki hevði hug at venja við superliguliðnum.

Og tað var so ein møguleiki, sum John einki hevði ímóti at royna. Fyrstu tíðina ræður eisini mest um at fáa alt í familjuni at ganga upp í eina heild, so enn stendur arbeiði ikki á skránni í gerandisdegnum. Og tí eru heldur eingir trupulleikar við at venja fyrrapartar.

– Í so máta livi eg sum yrkisleikari í løtuni. Mær vantar bara pengarnar, heldur John skemtandi fyri.

Sum skilst, so kendi Ove Christiansen ikki nakað serligt til føroyska landsliðsleikaran, men onkursvegna var hann so komin fram til, at maðurin hevur leikt 57 ferðir á landsliðnum, og at hann við átta málum er millum teir mest skorandi føroyingarnar. Nakað sum hann helt vera vert at kanna nærri.

Ætlanin var eisini, at John skuldi verða við á eykaliðnum hjá Viborg, tá hesir skuldu spæla í Randers sunnudagin. Dystirnir hjá eykaliðnum eru ikki skrásettir, so tá hevði tað ikki talt, at John Petersen einki spæliloyvi hevur.

Kuldin í Danmark gjørdi so, at tann dysturin var av ongum sunnudagin, men møguliga verður talan um dyst mánakvøldið ístaðin.

## Tekur tað róligt

Sjálvur tykist John tó taka nýkomna møguleikan sera róligt.

– Sjálvandi taki eg av, um eg brádliga fái boðið ein sáttmála, men tað er so ikki nakað, sum eg hugsi ítøkiliga um. Eg verði so ikki vónbrotin, um einki meira hendir.

Og so staðfestir hann eisini, at hóast alt skuldi gingið eftir vild í hesum sambandi, so er framvegis ikki víst, at hann aftur verður á føroyska landsliðnum.

– Har havi eg jú sagt, at eg eri givin. Viborg er eisini eitt felag, við upp ímóti 30 leikarum í superliguhópinum, so skuldi tað hent, at eg fái sáttmála, so er framvegis langt á mál, áðrenn eg fái góða dystarvenjing.

Men talan er kortini um venjing á høgum støði. Vigar hon ikki nakað?

– Sjálvandi. Eg merkti eisini alt fyri eitt, at eg havi ligið brakk í ein mánað ella so. Men hinvegin, so haldi eg ikki, at eg datt heilt burtur ímillum. So vit fáa at síggja, hvat tað heila endar við, staðfestir altso fyrrverandi landsliðsleikarin at enda.

StÍF-Søljan 22-28 (7-19):

# Munurin staðfestur

**Søljan punkteraði dystin fyrsta korterið, og so ráddi bara um at koyra stigini heim**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki stórvegis roks um úrslitið, tá Søljan vitjaði á Skála sunnudagin. Søljan hevur annars havt nakað av mótburði seinastu tíðina við tapum fyri VB, Stjørnuni og Neistanum, men tær reistu seg so dyggiliga í dystinum móti StÍF.

Longu eftir fyrsta góða korterinum stóð 4-13 á máltalvuni, og tó at StÍF slapp betri við í spælið, sum dysturin leið, so stóð alla tíðina greitt, at stigini undir ongum umstøðum vórðu verandi í høllini á Skála.

Sum ikki einaferð, so vóru tað tær báðar, Nicoleta og Lina, sum stóðu fyri flestu málunum hjá Søljuni, og tað er einki at ivast í, at júst tær báðar eiga sín stóra lut í, at Søljan nú hevur flutt seg fleiri fet upp eftir stigatalvuni.

Hinvegin tykist líka so lítil ivi vera um, at eisini lokalu leikararnir á liðnum hava ment seg nógv seinastu tvey-trý árini. Serstakliga er verjuparturin batnaður heilt nógv, og við leikarum sum Arnleyg Haraldsen og Heidi Mariu Akselsen hevur Søljan eisini fingið leikarar, sum kunnu roknast upp ímillum tann betra endan av føroyskum leikarum.

Tí er einki at ivast í, at Søljan hevur skapt sær gróðrarlíkindi fyri eini støðugari tilveru í føroyska hondbóltsoddinum. Tað røkkur kanska ikki til heiðursmerki longu í ár, men kósin er í øllum førum bein.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-Søljan 22-28 (7-19)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Rebekka Justinussen 11(3), Poula D. Olsen 6, Paula B. Høgnesen 3(3), Sunfríð B. Jacobsen 2, Malan Petersen 1
**Søljan:** Nicoleta R. Hansen 11, Lina Andriulyte 6, Arnleyg Haraldsen 3, Hertha J. Simonsen 3, Heidi Maria Akselsen 2, Fía Selma Nielsen 2, Jana Jacobsen 1
**Brotskøst:** ***StÍF 7, Søljan 3***
**Útvísingar:** ***StÍF 2, Søljan 2***
**Dómarar:** Kristian Johansen & Dánjal Samuelsen


VERKSTAÐIÐ VÓN

## Jólasølan hjá Verkstaðnum Vón

Árliga jólasølan verður á Verkstaðnum mikudagin 24. november frá kl. 14.00-20.00 og hósdagin 25. november frá kl. 14.00-19.00.

Møguleiki verður at keypa sær drekkamunn við onkrum heimabakaðum afturvið.

**Øll eru vælkomin.**

**Verkstaðið Vón**
Hóvabrekka 1 · Argir